# Heidi koppaði Nikláa

**– Eg eri púra ovfarin av hesum úrslitinum, sigur nývaldi tinglimurin fyri Tjóðveldisflokkin í Norðurstreymoy, Heidi Petersen. Hetta er fyrstu ferð hon stillar upp til løgtingið**

VAL
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*



*Heidi Petersen er nývald fyri Tjóðveldisflokkin í Norðurstreymoy*

Tjóðveldisflokkurin megnaði at vinna tann næst valda tinglimin úr Norðurstreymoyar valdømi. Tað gjørdist kanska heldur óvæntað Heidi Petersen, sum er búsitandi í Vestmanna.

Hon fekk 203 persónligar atkvøður og vann tí á Nikláa Petersen úr Kollafirði, sum hevur sitið á tingi fyri Tjóðveldisflokkin undanfarna valskeið. Niklári fekk hesuferð 171 persónligar atkvøður afturímóti 225 við seinasta val.

Ikki óvæntað var Sambandsflokkurin størsti flokkur við 663 atkvøðum, og Bárður Nielsen var tann stóri atkvøðuslúkurin við 357 persónligum atkvøðum.

Heidi Petersen hevur ongantíð áður stilla upp til løgtingsval, men møguliga var hetta til hennara fyrimun. Hon er tó mest glað fyri úrslitið hjá flokkinum.

– Útlitini hjá okkum vóru jú so ring í veljarakanningunum undan valinum. Vit høvdu fyrireikað okkum til at fáa seks tinglimir, men nú endaðu vit sum størsti flokkur á tingi, sigur Heidi Petersen.

Um tað at hon koppaði Nikláa Petersen sigur Heidi, at slíkt altíð kann henda í politikki. Blaðið royndi at fáa eina viðmerking frá Nikláa, men tað eydnaðist ikki.

### Ikki ókend í politikki

Hóast Heidi Petersen ongantíð áður hevur stilla upp til løgtingið, so er hon als ikki ókend í Tjóðveldisflokkinum. Hon hevur seinastu tvey árini sitið sum formaður í aðalstjórn flokksins og sum formaður í Norðurstreymoyar Tjóðveldisfelag. Hon kennir tú flokkin innanífrá og veit, hvussu flokkurin virkar.

Eisini var hon í 1988 við til at stovna tann tiltikna kvinnulistan, sum hevur havt valdið í Vestmanna í nógv ár. Hon sat í bygdaráðnum frá 1988-92, tá hon tók seg úr kommunalpolitikki.

Spurd hvørji mál hon fer at arbeiða fyri lokalt í komandi valskeiði, sigur Heidi Petersen, at flokkurin ikki hevur lovað nakað gylt vallyfti í valstríðnum, men Fiskivinnuskúlin í Vestmanna er nakað, sum liggur henni á hjarta.

– Projekteringin fyri einum nýggjum skúla skal vera liðug í oktober, og hesum ætlanunum fer man at hava eitt vakið eyga við, sigur Heidi Petersen.

### Tann breiða samgongan

Heidi Petersen hevur eitt ynski um eina breiða samgongu, sum so má vera ímillum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin.

– Tað er ringt at siga, men ein breið samgonga hevði verið ynskiligt, men vit mugu ikki útiloka nakran møguleika sigur Heidi Petersen, sum samstundis vil takka øllum, ið stuðlaðu Tjóðveldisflokkinum og eisini teimum, ið góvu henni persónligan stuðul á valinum.

Annars er Heidi Petersen upprunaliga úr Kvívík, men hon hevur búð í Vestmanna í 20 ár. Hon fekk prógv á Føroya Læraraskúla í 1985 og hevur starvast sum lærari í Vestmanna. Hon er 44 ára gomul og er gift við Tummas Christophersen. Tey eiga fýra børn og tvey ommu- og abbabørn.

# Eingin broyting á Sandoynni

**Tjóðveldisflokkurin megnaði at vinna ein sera tepran sigur á Fólkaflokkinum á Sandoynni, meðan Javnaðarflokkurin vann tryggan sigur**

VAL
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Tann stóri spurningurin í Sandoyar valdømi var, hvør fór at fáa tann næst valda mannin. Tað fór at standa ímillum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, sum royndi at endurvinna tingsessin. Eingin ivi var hinvegin um, at Javnaðarflokkurin við Gerhard Lognberg úr Skopun fór at vinna.

Endin var, at Tjóðveldisflokkurin og Páll á Reynatúgvu drógu longra stráið við 25 atkvøðum frammanfyri Fólkaflokkin.

– Tjóðveldisfólk í oynni hava gjørt eitt sera stórt arbeiði fyri at tryggja flokkinum tann eina mannin í hesum valdøminum, sigur ein fegin Páll á Reynatúgvu, sum varð valdur fyri triðju ferð.

Tann stóra veljarakanningin, sum Sosialurin og Fynd gjørdu í samstarvi við Føroya Tele gjørdu fyri valið, vísti, at Tjóðveldisflokkurin fór at missa mannin í Sandoynni.

– Veljarakanningin var góð fyri okkara viðkomandi, tí hon vísti, at tað var sera tætt um tann síðsta mannin, og tað hevur virkað til okkara fyrimun, er metingin hjá Páll á Reynatúgvu.

### Polarisering

Á Sandoy vísti tað seg, at skopuningar stóðu mannsterkir um borgarstjóran Gerhard, og sandingar gjørdu manngarð um Páll á Reynatúgvu. Tað er mangan soleiðis, at skopuningar royna at tryggja sær tann eina mannin, meðan sandingar royna tað sama.

Samlaða úrslitið var annars, at Javnaðarflokkurin fekk 326 atkvøður, Tjóðveldisflokkurin 284 og Fólkaflokkurin 259.

# Eg var bangin fyri tí

**Hendrik Old gjørdist ov stuttur og fall, eftir at hava sitið sum løgtingsmaður fyri Suðuroynna síðani 1984. Men hetta kom ikki óvart á, tí hann roknaði við hesum eftir úrsltið við seinasta val og eftir ábendingar seinnu dagarnar**

LØGTINGSVALIÐ
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í Suðuroynni gjørdtist tætt millum valevnini, og Hendrik Old fall á javnaðarlistanum, meðan Sverri Midjord tók sessin. Sverri fekk enntá fleiri atkvøður á Tvøroyri, enn formaður floksins. Sostatt eru bæði umboðini á javnaðarlistanum úr norðaru helvt av Suðuroynni.

Hendrik Old fall og kappingin í syðru helvt av Suðuroyni við Mikkjal Sørensen gjørdi, at báðir gjørdust ov stuttir og fall sessurin tí til Tvøroyrar.

Hendrik sigur, at hann var bangin fyri, at hetta fór at henda. Hann hevði úrslitð frá seinasta vali í huganum. Tá vóru bert eini 2 atkvøður á munni á Hendrik og Sverra.

Men Hendrik fegnast um stóru framgongdina, sum hann hevði hesaferð og nevnir, at tær 50 atkvøðurnar, hann fekk í Sumba vísa, at har atkvøddu tey eftir at fáa umboð í syðru helvt.

Hendrik fekk 291 atkvøður og Mikkjal Sørensen 253. Hendrik hevði framgongd, men hann fryktaði tó fyri úrslitinum, tí ymsar ábendingar hava verið seinnu dagarnar, so hetta kom ikki óvart á, sigur hann.

Tó nevnir hann, at um Javnaðarflokkurin fer í samgongu, so fer Jóannes Eidesgaard í Tinganes og so er Hendrik Old næstur á listanum og innan tinggáttina.

# Fýra atkvøður gjørdu munin

**Ofta skal lítið til at gera av, hvør kemur á ting og hvør fellur. Í Suðuroynni gjørdu fýra atkvøður munin**

VAL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Suðuroyggin verður onkutíð søgd at verða eitt valdømi, har atkvøður verða fluttar, so tað kann gera mun.

Fýra atkvøður á muni millum Hendrik Old og Sverra Midjord gjørdu, at Sverri kom inn og Hendrik fall.

Syðra helvt býtti í stóran mun javnaðaratkvøðurnar í tvey, nenviliga millum Hendrik Old, Vágur, og Mikkjal Sørensen, Porkeri. Hóast framgongd hjá báðum, so hervði hetta við sær, at ov lítið bleiv hjá báðum, eisini hjá tingmanninum Old. Ístaðin lá Sverri Midjord, Tvøroyri, frammanfyri í persónligum atkvøðum og varð sostatt valdur. Sverri Midjord fekk 295 atkvøður, Hendrik Old 291 og Mikkjal Sørensen 253.

Sostatt fall javnaðartingmaðurin í syðru helvt og javnaðarlistin á Tvøroyri fekk ístaðin tveir valdar.



# Valhýrurin var góður



*Jógvan á Lakjuni, afturvaldur fyri Fólkaflokkin*

*Foto: Maria Olsen*

**Løgtingsvalið 2004 upptók eysturoyingar líka nógv sum føroyingar annars og vit hittu veljarar, valnevndarfólk og valevni á Skálafjørðinum, í Gøtu og í Fuglafirði**

VALIÐ 2004
*Búi Tyril*

Í Runavík varð Ítróttarhøllin brúkt til valhølir og hon fungeraði væl sum vanligt. Alt gekk skjótt og smidliga fyri seg undir leiðslu av Leivi Højgaard, sum er formaður í valnevndini har.

– Av 1806 sum høvdu valrætt greiddu 1624 atkvøðu, kundi Leivur Højgaard upplýsa.

– Við øðrum orðum var luttøkan 89,9 prosent og tað var eitt sindur betri ein við seinasta val.

Í Gøtu vitjaðu vit eitt av valevnunum hjá Fólkaflokkinum, Hannu Jensen, nakað áðrenn tað endaliga valúrslitið fyrilá. Har var lív í og nógvir gestir og Hanna fekk fitt av atkvøðum eisini, hóast hon ikki røkk inn um tinggátt: 100 persónligar.

– Næstu ferð verður kanska betri, helt hon skemtingarsamt fyri.

Í Mentanarhúsinum í Fuglafirði hildu tjóðveldisfólk kafé og valvøku við stórskíggja. Tær kensluligu bylgjurnar gingu sum vera man í takt við ta stigvísu upprokningina av valúrslitinum. Tá av tornaði var hýrurin góður, eisini á valevnunum Andrea Eldevig ið fekk 81 persónligar atkvøður og Jón Tyril ið fyri fyrstu ferð stillaði upp og fekk 55 atkvøður.

– Snekkjan hjá Tobba í Norðurlandahúsinum fekk lív aftur í fólkið, helt onkur fyri.

Beint tá kom ein annar fuglfirðingur framvið, nevniliga Jógvan á Lakjuni sum við sínum 409 persónligu atkvøðum varð afturvaldur inn á ting fyri Fólkaflokkin.

-– Eg eri takksamur fyri álitið, viðmerkti Jógvan á Lakjuni; hann hevði sum vera eisini opið hús til seint út á náttina.

Og soleiðis var lagið yvir tað mesta av tí politiska landslagnum. Alla staðni har vit komu var hýrurin yvirhøvur góður.

Tilsamans 6879 fólk í Eysturoy greiddu atkvøðu og hetta merkir at valluttøkan her var 91,9 prosent.



*Hanna Jensen, valevni fyri Fólkaflokkin*

*Foto: Maria Olsen*



*Alfred Olsen, til høgru varð afturvaldur fyri sambandsflokkin: hann kom inn í 1998 og avloysti tá hálvbeiggjan Jógvan Ingvard, til vinstru, sum umboðaði sambandsflokkin í løgtinginum frá 1970-1998. Alfred og Jógvan Ingvard eru synir til Jens Christian Olsen, sála, ið sat á tingi frá 1940 til sín doyggjandi dag í 1963, við undantak av trimum árum. Í miðjuni einkjan eftir Jens Christian, Hildur*

*Foto: Maria Olsen*



*Andrea Eldevig og Jón Tyril, valevni fyri Tjóðveldisflokkin*

*Foto: Maria Olsen*



*Leivur Højgaard, formaður í valnevndini, á odda fyri uppteljingini í Runavík*

*Foto: Maria Olsen*